**SERTILBOÐ**
Sky digital og Orbit Network.
prísur 4.995,-
avmarkað
Kort og móttakari, alt fæst nú á einum stað.
Kortsáttmála beinleiðis við Sky Digital.
Sjálvandi tann tryggasta loysnin.
Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tlf 421411 ella 215328
Inter Sky Line
Fígging kann útvegast



KIA CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel16 V, 126 HK, 5 hurðar



Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.
D. B. Bilar
Tel. 310 600

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir

Uppsetan og skipan av barrum
Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tílíkt
Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo



# Birgir Danielsen farin



Leygarkvøldið 20. oktober er andaðist Birgir Danielsen. Í fleiri ár hevur hevur Birgir stríðst við heldur vánaliga heilsu, uttan at tú hevur merkt nakað serligt á honum. Men seinastu vikurnar var heilsan rættiliga farin at bila. Hann hevur ligið álvarsliga sjúkur á Ríkissjúkrahúsinum í eina tíð, og vit hildu okkum hóma, hvønn veg tað bar.

Birgir varð føddur í Kvívík hin 5. juli 1928, og var sostatt 73 ára gamal, nú hann doyði. Hann var sonur kenda skiparan Christian Danielsen og konuna Honnu. Hóast hann flutti heimanífrá á ungum árum og kom at virka víða um í heiminum, varð hann alla sína tíð Kvívíkskingur. Hann var familju- og bygdakærur.

Birgir Danielsen gjørdist ein av okkara fremstu vinnulívsmonnum. Hann byrjaði við at fáa sær dygga útbúgving. Sum ungur drongur kom hann til Havnar, tað var undir krígnum, at ganga á prelimininer- og studentaskúla. Síðani fór hann til Danmarkar, har hann tók prógv sum civilverkfrøðingur á Danmarks Tekniske Højskole í 1954. Hann starvaðist so fyrst í nøkur ár sum amanuensis á hesum lærustovni, fyri síðani at fara víðari innan vinnulívið úti í víðu verð. Frá 1957 til 1961 arbeiddi hann sum verkfrøðingur hjá KGH og frá 1961 til 1964 var hann í starvi sum stjóri hjá Findus A/S í Noregi. Í 1965 fór hann til Sveits, har hann var leiðari av menningardeildini hjá Nestlé Vevey til 1969.

Í 1969 leitaði nevndin í Føroya Fiskasølu eftir nýggjum stjóra til felagið aftaná Dánjal Niclasen, sum vegna aldur ynskti at leggja frá sær. Heitt varð tá á Birgir um at taka við hesum starvi, og játtaði hann. Frá 1. juli 1969 til 31. desember 1990 røkti hann hetta stjórastarv í eini fyritøku, sum var Føroya størsta og umsat útfluttningin av vørunum hjá flestu av landsins framleiðslufyritøkum. Fiskasølan átti eisini partar í øðrum stórum virkjum, og á hendan hátt kom hann eisini í næstan líka mong ár at hava stóra ávirkan á hesi feløg. Hann var meginpartin av hesum tíðarskeiði nevndarformaður í Havsbrún í Fuglafirði og líka til 1992 var hann nevndarformaður í Sjóvinnubankanum. Eisini var han nevndarlimur í Faroe Seafood Hirtshals og Grimsby.

Tað var óiva ein stór avgerð at taka, bæði fyri Birgir sjálvan og familjuna, tá hann flutti úr Sveits og kom heimaftur. Men hann sá skjótt at nógv arbeiði lá fyri hann í Føroyum og stórar vóru avbjóðingarnar. Hann legði eisini alla sína arbeiðsorku í at virka fyri tey feløg, sum hann kom at hava við at gera. Hann var bæði dugnaligur og nærlagdur, og hann var heilt greiður yvir, at arbeiði hansara hevði alstóran samfelagsligan týdning, tí fyritøkurnar taldu so nógv í samfelagnum. Birgir Danielsen kemur at standa sum ein stórur varði í føroyskari vinnulívssøgu seinastu tríati árini.

Arbeiðssemi hansara og áhugi fyri samfelagnum vísti seg eisini í, at aftaná at vera fráfarin sum Fiskasølustjóri tók hann uppá seg arbeiðsuppgávur í alivinnuni sum stjóri í P/F Navir, og harafturat stillaði hann upp til løgtingsvalið í 1990 og varð valdur inn á ting.

Fyrsta eg minnist Birgir var, tá hann kom til Havnar at ganga í skúla. Hann kom tá at búgva hjá mostur míni. Hann var nøkur ár eldri enn eg, so nakar veruligur kennskapur bleiv tað ikki til tá, men aftaná 1969 hava vit havt nógv við hvønn annan at gera. Sum grannskoðari kom eg at arbeiða nógv saman við honum bæði í Fiskasøluni, Sjóvinnubankanum og Havsbrún. Eg kom at kenna ein álitismann, ein mann, sum tað altíð bar til at tosa við, eisini at skifta orð, tá vit ikki vóru heilt samdir. Birgir setti seg inn í málini, hann vitsti, hvat hann hevði við at gera og royndi altíð at finna loysnir.

Eisini í politikki høvdu vit eitt gott samarbeiði. Onkuntíð vísti tað seg, at vit vóru ósamdir, men virðingin var alla tíðina til staðar og ongatíð stóðst ilt ímillum okkara. Stórstu royndirnar saman høvdu vit helst í 1992, tá vit sótu í Keypmannahavn og viðgjørdu Sjóvinnubankan. Tá brutu nakrir sjógvar bæði fíggjarliga og politiskt. Men Birgir stóð sum ein maður. Menniskjansligu eginleikarnar sær ein best í royndarstundum. Hjá mær er ein góður vinur farin.

Birgir var giftur við Binu úr Klaksvík. Hjúnalag teirra var langt og gott. Saknurin hjá henni verður stórur og tað sama hjá børnunum, Una og Gunn, og familjum teirra. Má Harrin styrkja tykkum í hesi tungu tíð.

Friður veri yvir minninum um Birgir Danielsen.

**Jógvan Sundstein**

ítróttur
Nr. 204 • týsdagur • 23. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Eitt lið av landsliðsspælarum er burtur

**Bara ein lítil helmingur av teimum, sum fyri tveimum árum síðani vórðu roknaðir at eiga bjarta framtíð, eru væl fyri á ferðini í Slovenia**

U–19 LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*



*Jón Rói Jacobsen, sum longu hevur roynt seg á A-landsliðinum, telist millum týdningarmestu leikararnar á føroyska U-19 landsliðnum í fótbólti*

Mynd: Álvur Haraldsen

Tað er eingin loyna, at tað skal drúgvt arbeiði og nógv stríð til at ala fótbóltsspælarar. Hetta eru royndirnar í feløgunum, og hetta eru eisini royndirnar á yngru landsliðunum. Spælarar fella frá, tí teir verða skaddir, ella tí teir missa hugin og tískil vilja ikki halda fram at leggja so nógv í venjingina, sum teir hava gjørt.

Í gjár fór U–19 landsliðið av landinum. Talan er um síðstu fótbóltsferðina hjá føroyingum í hesum árinum. Landsliðið skal luttaka í EM undankapping í Slovenia. Mótstøðuliðini eru Skotland, Slovenia og Grikkaland.

## Góð evni

Jógvan Martin Olsen, sum leygardagin kom aftur at U–17 landsliðsferð í Sveis, er venjari hjá U–19 landsliðnum. Um hetta er síðsta ferðin hjá honum í hesum umfarinum saman við einum landsliði er ikki greitt enn, men tað er greitt, at hann fer ikki at halda fram at samstarvast við Fótbóltssambandið á sama hátt, sum hann hevur gjørt hesi seinastu árini, tá hann hevur verið hjálparvenjari hjá Allani Simonsen, venjari hjá U–19 landsliðnum og høvuðsábyrgdarmaður fyri hinum yngru landsliðunum.

Tað eru átjan spælarar í ferðalagnum, sum er farið til Slovenia. 1983 árgangurin hevur leingi verið mettur sum ein tann besti av føroyskum fótbóltsspælarum.

– Í 1999 stóð hetta liðið seg sera væl. Í NM kappingini fyri U–17 landslið megnaðu teir málleysan javnleik ímóti Danmark, og teir taptu tepurt 2–1 ímóti Íslandi. Hevði tað gingið eftir ætlanini, so høvdu somu spælararnir nú luttikið í síðstu kappingini fyri U–19 landslið. Men vit mugu staðfesta, at nógvir av teimum eru ikki við longur, sigur Jógvan Martin Olsen.

## Árgangurin nógv minkaður

Venjarin sipar m. a. til verjuna, sum var við fyri tveimum árum síðani. Hon sá soleiðis út: Arnold Berg, Skáli, Kristian á Lakjuni, KÍ, Vagnur Mohr Mortensen, HB, Elfinn Ørvarodd, FS Vágar. Eingin av hesum spælarunum er í ferðalagnum í Slovenia. Arnold hevur havt betri hug til hondbóltin síðsta árið, Kristian er givin, Vagnur hevur síðani í summar verið plágaður av skaða í lærkrikanum, og nú er hann eisini skaddur í rygginum, og Elfinn hevur verið til skips, og hann er nú farin avstað aftur.

Fróði Jóanesarson var álopsmaður, men hann hevur ikki gjørt so nógv við venjingina síðsta árið. Atli Danielsen, Jón Rói Jacobsen og Símun Joensen eru við í Slovenia, men teir kundu allir havt verið betri fyri. Atli og Jón Rói hava síðsta mánaðin verið so mikið plágaðir av skaðum, at teir ikki hava fingið vant við fullari ferð, og Símun Joensen er komin beinleiðis úr USA og til Slovenia. Har, sum hann er í USA, ber ikki til at spæla fótbólt á tí støðinum, sum landsliðsspælarar helst skulu venja og spæla á. Símun hevur luttikið í nógvum ítrótti, og hann hevur vant við bólti, men tað ber illa til hjá honum at vera í dystarvenjingini, sum hann var í, tá hann fyrst í august fór avstað.

– Vit hava havt fleiri av næsta árganginum at hjálpa til, men har hava teir eisini verið óhepnir, sigur Jógvan Martin Olsen.

Í tí sambandinum sipar hann m. a. til Inga Højsted í Arsenal, sum ikki enn er komin seg so mikið eftir beinbrotið, at hann kundi fara við til Slovenia.

Ætlanin var, at Rasmus Nolsøe úr TB skuldi fara við, men hann varð skaddur í síðstu viku, tá U–17 landsliðið var í Sveis. Ein annar av yngra árganginum, sum hevur sýnt sera góð evni, er Rani D. Christiansen. Í fjør fekk hann trupulleikar við krossbandinum. Hann hevur ikki spælt í ár, men tað gongur rætta vegin hjá honum.

## Nýggir taka við avbjóðingini

At so nógvir av ymiskum orsøkum ikki eru tøkir hevur sjálvandi stórt árin í einum so lítlum samfelag sum tí føroyska.

Teir, sum nú eru í Slovenia, eru evnaríkir, men sjálvandi fer tað at kennast aftur, at tað nú eru fleiri, sum eru eitt og tvey ár yngri, enn spælararnir eru á liðunum, sum teir fara at spæla ímóti. Liðið varð úttikið, áðrenn U–17 landsliðið fór til Sveis. Nú Rasmus Nolsøe noyddist at geva avboð, er Eli Thorsteinsson úr HB úttikin í staðin. Saman við liðfelaganum Róki Jespersen er hann á Hesselgods fótbóltsskúlanum, sum Brøndby rekur í Grenå. Talan er um 10. skúlaár við nógvum fótbólti á skránni. Millum lærararnar eru Kent Nielsen og Flemming Povlsen, sum í 1992 vóru við til at vinna EM heitið til Danmarkar.

Spælararnir í føroyska U–19 hópinum eru Pól Næs Joensen, HB, Áki Petersen, ÍF, Atli Danielsen, KÍ, Bárður Christiansen, HB, Bjarni Jørgensen, HB, Jón Rói Jacobsen, HB, Jann Ingi Petersen, B68, Símun Joensen, KÍ, Gilli Haraldsen, Frederikshavn, Heini í Skorini, B36, Hjalgrím Elttør, KÍ, Kári í Lágabø, VB, Bárður Dimon, TB, Eli Thorsteinsson, HB, Áki L. Hansen, NSÍ, Heini Jacobsen, Sumba, Kai Ennigarð, GÍ, og Rókur Jespersen, HB.

Umframt Jógvan Martin Olsen hava Mathias Davidsen og Bill Jacobsen verið heima og vent og skulu nú aftur til Slovenia. Rúni Mohr er liðleiðari, og Øssur Steinhólm er fysioterapeutur.